NUMO

# Føroyska barnahjálpin

# (ABC Barnahjálp)

# Ársfrásøgn 2016

*NUMO, løggilt grannskoðanarvirki Sp/f*
Postsmoga 144 · 710 Klaksvík · Tel. 20 13 13 · Postsmoga 1165 · FO-110 Tórshavn · Tel. 20 13 13 · numo@numo.fo · www.numo.fo

**Innihaldsyvirlit** **Síða**


| Innihaldsyvirlit | Síða |
| --- | --- |
| Upplýsingar um felagið | 3 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 5 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |

## Upplýsingar um Føroysku barnahjálpina

| | |
|---|---|
| Endamál | Føroyska barnahjálpin hevur til endamáls, at stuðla menniskjum, serstakliga børnum og ungum í tilafturskomnum londum, til sjálvbjargni. |
| Heimasíða: | www.abc.fo |
| Leiðsla: | Rúna Sivertsen, forkvinna<br>Hilda Viderø, næstforkvinna<br>Randi Jacobsen, peningarøkil<br>Charlotta á Váli Olsen, skrivari<br>Ólavur Asafsson Olsen |

## Leiðsluátekning

Ársfrásøgnin hjá felagnum fyri 2016 er góðkend av nevndini.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skyldum, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Ársfrásøgnin verður herviðløgd fyri aðalfundin til góðkenningar

Tórshavn, hin 16/8 -2017

Rúna Sivertsen

Hilda Viderø

Randi Jacobsen

Charlotta á Váli Olsen

Ólavur Asafson Olsen

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Føroysku barnahjálpini fyri roknskaparárið 2016 við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og nýttum roknskaparhátti. Grannskoðað er sambært galdandi grannskoðanarreglum.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**
Nevndin hevur ábyrgd av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd samsvarandi galdandi reglum. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgnin kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi grannskoðarareglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru skeivleikar av týdningi í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðaraprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum nevndin nýtir er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum nevndin nýtir eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31.12.2016 og av úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparskeiðnum frá 01.01. - 31.12.2016 samsvarandi vanligum roknskaparreglum.

Tórshavn, hin 16.08.2017

**NUMO**
løggilt grannskoðanarvirki Sp/f

Símun Absalonsen
*Statsaut. revisor*

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin er uppsettur sambært eftir vanligum reglum um góðan roknskaparsið.

**Inntøkur**

Inntøka er tikin við í rakstrarroknskapin, um rættur er vunnin til inntøkuna áðrenn roknskaparlok.

**Kostnaður**

Kostnaður er tikin við um veiting er farin fram í árinum.

**Gjaldføri og áogn**

Áogn og gjaldføri er tikin við til áljóðandi virði.

**Skuld**

Øll skuld er virðisásett til áljóðandi virði.

## Rakstrarroknskapur 01.01 - 31.12.2016

| | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Stuðul til Liberia | 522.369 | 334.173 |
| Stuðul til Senegal | 139.390 | 142.685 |
| Stuðul til Pakistan | 71.670 | 38.907 |
| Stuðul til Filipsoyggjarnar | 127.970 | 17.860 |
| Stuðul til India | 6.100 | 19.101 |
| Stuðul til Kenja | 4.600 | 4.600 |
| Stuðul til rakstur | 84.672 | 101.760 |
| Stuðul til lønir | 35.514 | 42.850 |
| Skava og vinn | 72.552 | 0 |
| Onnur tiltøk | 36.747 | 46.116 |
| Innsavnan bússur | 86.966 | 122.142 |
| | **1.188.549** | **870.194** |
| Goldið til Liberia | 516.443 | 345.915 |
| Goldið til Senegal | 136.778 | 147.826 |
| Goldið til Pakistan | 72.311 | 37.549 |
| Goldið til Filipsoyggjarnar | 124.779 | 21.100 |
| Goldið til India | 14.303 | 21.664 |
| Goldið til Kenja | 9.246 | 0 |
| Tilfar til stuðulstiltøk | 42.336 | 0 |
| | **916.196** | **574.054** |
| Telefon o.l. | 6.063 | 13.313 |
| Skrivstuvuhald, fundir o.l. | 11.024 | 7.892 |
| Grannskoðan | 7.500 | 7.500 |
| Lýsingar og reklama | 4.349 | 10.651 |
| Ferðing, dagpengar o.l. | 106.648 | 67.677 |
| Ymiskt | 6.539 | 52.267 |
| Bankakostnaður o.l. | 11.326 | 14.853 |
| Rentur | 174 | 75 |
| Skattafrí samsýning | 108.000 | 97.000 |
| | **261.623** | **271.228** |
| **Rakstrarúrslit** | **10.730** | **24.912** |

# Fíggjarstøða pr. 31.12.2016

| | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| Innistandandi í fíggjarstovnum | **57.922** | **81.427** |
| | | |
| **SKYLDUR** | | |
| Onnur skuld | **0** | **34.235** |
| | | |
| **Kapitalkonta:** | | |
| Salda 01.01 | 47.192 | 22.280 |
| Úrslit | 10.730 | 24.912 |
| Salda 31.12 | **57.922** | **47.192** |
| | | |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **57.922** | **81.427** |